Vikuskiftis Sosialurin






# Damurnar dusaðu sær

**- Her eru nógvir bindiklubbar, og eg síggi eisini, at tað eru ikki bara fólk av Tvøroyri, men eisini úr Vági, Porkeri og Hvalba, sigur Heidi Djurhuus forkvinna í ungdómsdeildini hjá TB. Hon var ein av fyrireikarunum av stóra kvinnukvøldinum, sum var í Trongisvági síðsta leygarkvøld**

UNDIRHALD
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Myndir: Bjarni Nygaard*

Ikki færri enn 204 uppsnollaðar damur møttu til borðhald, make-over, mótasýning og fyrilestrar í høllini í Trongisvági síðsta leygarkvøld.

- Handilslívið skipaði fyri einum kvinnutiltaki á hotellinum í fjør. Men har passaðu bara 70 fólk inn. Tí fingu vit hetta hugskotið, at endurtaka tað í ár, men her í høllini, tí her er betur pláss, sigur Heidi Djurhuus, sum helst hevur havt úr at gera seinastu vikurnar, at fáa alt upp á pláss.

Kortini hevur handilslívið í bygdini góðar møguleikar at sýna nýggjastu vørurnar fram fyri møguligum kundum hetta kvøldið í høllini. Bæði Toystovan, CN Wear, Trillan, Rainfan og Tip-Top hava fagurt prýddir básar í forhøllini, og eisini skipa tey fyri mótasýning við tí nýggjasta í vetur, bæði til innast og uttast.

Kvøldið byrjar við, at Margit Steinkross, sum forrestin er systir navnframa Jack Petersen, bjóðar vælkomin. Hon er bæði lívlig og frísk og fýrir eina góða av viðhvørt.



Make-over er vorðið alt meiri vælumtókt í seinastuni. Svanna Petersen, sum er útbúgvin make-up artistur og ger manicure, smyr mammu sínari Guðrun uppi ápallinum. Eitt videokamera fylgir við, og varpar upp á eitt stórt lørift uppi yvir teimum. Onkur sigur, at Svanna skjótt fer at lata upp vakurleikastovu við frisør mitt í bygdini.

Tvær kvinnur norðanífrá eru komnar suður at greiða frá um at klænka og litir og stíl. Tær eru Jana Thomsen, sum var leiðari í Fragd og Fimi í 21 ár, sum nú greiðir frá um slankipulvur og krem frá LR, og Lydia Petersen úr Klaksvík, sum er lit og stíl serfrøðingur. Síðsti fyrilesturin er av lokalu jarðarmóðrini, Bjørg av Rana, sum lovar ikki at tosa um føðifyrireiking í kvøld. Harafturímóti hevur hon valt at tosa um kvinnur, sjálvsálit og sjálvsvirðing.

Áðrenn tiltakið byrjaði var Heidi Djurhuus eitt sindur nervøs fyri, um alt nú fór at eydnast í kvøld.

- Vit høvdu ætlað, at Anna Kirstin skuldi vera her í kvøld, men hon mátti fara norður. Hon kennir so væl umstøðurnar og teknikkin her í høllini, sigur hon, nú kvøldið er um at halla. Men tiltakið hepnaðist stak væl. Mikrofonin riggaði, fólk hugnaðu sær og prátað var dúgliga í steðginum – serliga úti í forhøllini, har sølubásarnir vóru. So henni hevði ikki nýtst at verið nervøs.

Aftaná tiltakið fóru damurnar í dans í klubbanum, har menninir høvdu mannfólkakvøld. Og munnu tey ikki hava svingað har til tann ljósa morgun?

